# KENNIR TÚ EIN ...

# PSYK

**HANN** VÍSIR SEG ALLASTAÐNI VIÐ JØVNUM MILLUMBILUM. VIÐ HÚS, Á ARBEIÐSPLÁSSUM, Í SAMKOMUM, Í SKÚLUM OG ALLA AÐRASTAÐNI, HAR FÓLK KOMA SAMAN. **PSYKOPATURIN**, SUM VIÐ SÍNUM SJÚKA ATBURÐI KANN DRÍVA SJÁLVT TANN STERKASTA HEILT ÚT Á EGGINA – OG EISINI ÚTAV, UM SO SKAL VERÐA.



HEILSA

Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

»Hann er fanin gali psykopat!«

Ja, vit kenna øll hesa niðurstøðuna, ið ofta verður knýtt at einum persóni, sum er so langt úti, at vit hava ikki orð fyri tí.

Myndaliga kunnu vit siga, at hann, við longum, svørtum eiturtøkutonnum og spískum klóm, krøkir seg náðileyst í krovið á offrinum. Og hann sleppur ikki, fyrr enn tað er sundurskrætt – bæði innan og uttan.

Við lygnum og sjarmu manipulerar hann fólk rundan um seg. Ofta frá stjórasessinum, terapi- ella prædikustólinum.

Roknað verður við, at eini tvey til fýra prosent av øllum monnum og eitt prosent av kvinnunum eru psykopatar. Sostatt eru umleið tvey prosent av fólkinum psykopatar, ella tað, sum á fínari læknamálið verður rópt Antisocial personality disorder (ASPD or APD).

Serfrøðin er samd um, at psykopati er ikki ein sjúka sum so. Tað er heldur eitt frávik í persónligheitini, sum bert fær ment seg undir ávísum umstøðum í einum samspæli millum íbornar eginleikar og umhvørvið.

Sostatt er sannlíkt, at annað ella bæði foreldrini eru psykopatar, og hava givið barninum ein kensluliga avstumpaðan uppvøkstur. At psykopaturin longu steðgaði kensluliga upp sum pinkubarn hevur við sær, at hann megnar ikki at elska onnur sum vaksin. Kortini fær hann ment seg sosialt og intellektuelt.

Hetta ger eisini, at tað er nærum ógjørligt at gjøgnumskoða psykopatin ella at geva honum eina diagnosu, og at tað er púra ógjørligt at grøða ella viðgera hann.

Sanne Udsen sigur í bókini »Psykopater i jakkesæt«, sum snýr seg um psykopatiskar leiðarar, at hetta er einasta sálarsjúkan, har tað ikki er sjúklingurin, men tey í nærumhvørvinum, sum líða.

Psykopaturin leitar sær bara hjálp, um »sjúkan« verður ein trupulleiki fyri hann sjálvan.

## Ísakaldir lygnarar

Júst vantandi samvitska og empati eru sereyðkenni við psykopatinum. Natúrligu forðingarnar, sum onnur kenna á sær, tá tey fara út um mark, eru ikki at finna hjá psykopatinum. Tí kann hann finna upp á at lúgva um slíkt, sum onnur ikki kundu fingið seg at logið um. Til dømis, at ein avtala má broytast, tí mamman doyði í nátt – hóast mamman er bæði frísk og livandi!

Sum heild verður hann drigin at avbjóðingum, sum geva vald, pengar, virðing og møguleikar fyri sjálvstøðugum avgerðum.

Eitt nú innan politikk, løgfrøði, løgreglu, trúðarlív, miðlar og terapi.

Nógvir av eginleikum hjá psykopatinum eru nógv eftirspurdir: tað at vera avgjørdur, hava sjálvsálit, at duga at seta sítt ígjøgnum og gera hugskot til veruleika. Alt eginleikar, sum eru positivir, um viðkomandi eisini hevur empati, samvitsku, ábyrgdarkenslu og evni at lurta – men tað hevur psykopaturin als ikki!

## Psykopatiski stjórin

Serliga kenna vit psykopatin frá arbeiðsmarknaðinum, har vit javnan hoyra um fólk, sum verða stýrd og niðurkoyrd av einum psykopatiskum leiðara.

Sum oftast velur hann sær tey

## Kennir tú ein psykopat?

Robert Hare er ein av heimsins fremstu serfrøðingum innan psykopati.

Hann hevur gjørt eitt yvirlit við 20 eyðkennum og eginleikum, sum kunnu geva eina hóming av, um ein psykopatur ger um seg í tínum nærumhvørvi.

Hóskar eitt punkt sera væl til persónin gevur tað 2 stig. Hóskar tað eitt sindur væl gevur tað 1 stig. Hóskar tað als ikki gevur tað onki stig. Í mesta lagi ber til at fáa 40 stig. Sambært Robert Hare er ein persónur við fleiri enn 30 stigum psykopatur.

Viðmerkjast skal, at yvirlitið er óegnað til kliniska diagnosu, men at tað kann hjálpa fólki við at finna psykopatar í nærumhvørvinum.

*Psykopaturin ...*

1. er væltalandi og sjarmerandi
2. er egosentriskur og stórlætisørur
3. hevur støðugan tørv á spenningi og nýggjum innskotum
4. lýgur og burturforklárar
5. er svikaligur og manipulerandi
6. kennir hvørki skuld ella angur
7. hevur eitt veikt og grunt kenslulív
8. kann ikki liva seg inn í støðuna hjá øðrum ella at hava empati
9. hevur ein nassandi lívsstíl
10. er snarsintur, illsintur og hevur lítið tamarhald á sær sjálvum
11. hevur nógv leys kynslig sambond / er ótrúgvur
12. hevði atburðartrupulleikar sum barn (yngri enn 12 ár)
13. hevur stutta tíðarkenslu / leggur ikki langtíðarætlanir
14. er impulsivur
15. er ábyrgdarleysur sum foreldur
16. hevur fleiri hjúnaskilnaðir / miseydnað parløg
17. var ungdómskriminellur (yngri enn 15 ár)
18. fremur lógarbrot, tá hann er royndarleyslatin
19. tekur ikki ábyrgd fyri egnum gerðum
20. fremur fleiri sløg av lógarbrotum, líka frá innbroti til narko, harðskap, kynsligan ágang og svik.

KELDUR:
»PSYKOPATER I JAKKESÆT« AV SANNE UDSEN - JYLLANDS POSTEN: »PSYKOPATER« AV KIM HUNDEVADT
POLITIKEN: »ARBEJDSPLADSENS PSYKOPATER KAN KOSTE DYRT« AV IDA EBBENSGAARD
WWW.WIKIPEDIA.COM: PSYKOPATI - WWW.NETDOKTOR.DK: KENDER DU EN PSYKOPAT?